Vikuskiftis Sosialurin

Nr. 233 - 1. desember 2006

# Vinnuháskúlin

BENADIKT JOENSEN,
HEÐIN ABRAHAMSEN OG
CLAUS THOMSEN

**Um Vinnuháskúlan (í fríum falli), undirvísing sum ikki riggar, kanningar av óreglusemi, felagið hjá (nøkrum fáum) maskinmeistaralærarum og vælmeinandi? tingmenn, sum ikki tíma at seta seg rættiliga inn í viðurskiftini á skúlanum**

Tað eru nú tvey ár síðani Sjómansskúlin og Maskinmeistaraskúlin vórðu lagdir saman í ein stovn við navninum Vinnuháskúlin og nýggjur stjóri settur. Ikki er lætt hjá starvsfólki, har summi hava arbeitt í 25 ár, at venja seg við nýggju viðurskiftini. Serliga broytingin, har teoretiska frálæran fer fram í Nóatúni, meðan praktiski parturin er lagdur undir Krákugjógv, hevur verið trupul at svølgja hjá summum.

Hetta seinasta hálvárið hevur skúlin næstan dagliga verið á breddanum í Kringvarpinum og bløðunum, og vanligi føroyingurin má hava fingið ta fatan, at talan er um ein stovn, sum er í upployson, har anarki valdar og fíggjarligt óreglusemi meira er reglan enn undantakið.

Serliga felagið hjá maskinmeistaralærarum hevur verið nógv frammi í pressuni, men eisini Maskinmeistaralærarafelagið hevur givið sítt íkast til skrivingina, og í seinastuni hava tingmenn við Annitu á Fríðriksmørk á odda og henni á baki Finnur Helmsdal, Tórbjørn Jacobsen og Bill Justinussen frá tingsins røðarapalli við avgjørdari rødd tosað um Vinnuháskúlan, sum er í fríum falli, har tól og útgerð fella í órøkt, meðan aðrir tingmenn hava verið meira moderatir í sínum viðmerkingum. Og vit mugu ikki gloyma Óla Jacobsen, men hann hevur annað at hugsa um í løtuni.

Málið um uppsagnarhótta læraran man eisini vera kent av øllum føroyingum, ogført hevur verið fram, at orsøkin til ætlanarskrivið er, at hann hevur gjørt av at kanna ávíst óreglusemi viðvíkjandi øðrum lærara, sum í arbeiðstíðini skal hava fingið útbúgving á Fróðskaparsetrinum við fullari løn. Seinasta fríggjadag hevði 62 norður í útvarpinum frásøgn um uppsagnarhótta læraran og gongdina í málinum við at kanna óreglusemi, og fekk ein ta fatan, at greinin í Oyggjatíðindi um júst sama evnið var komin heilt óvart á hann. Hetta fær nakrar av okkum at undrast stórliga, tí greinin í Oyggjatíðindi byggir júst á tilfar, sum hann hevur latið úr hondum. Men blaðstjórin á Oyggjatíðindi lýsti málið frá báðum síðum, og tí bleiv blaðgreinin ikki tann útspillingin, sum felagið hevði ætlað.

Hesar "avdúkingar" saman við áhaldandi tíðindastreyminum frá Felagnum Maskinmeistaralærarar um "støðuna" á skúlanum og fyrispurningum til landsstýrismannin í mentamálum frá tingmonnum hevur havt sína kraftigu ávirkan má sigast. Bert ein umsókn er komin til maskinmeistaraflokkin, sum ætlandi skal byrja í januar, og bert tríggjar umsóknir til skipsføraraflokkin. Tilgongdin seinastu árini til SEQ CHAPTER \h \r 1maskinmeistaraútbúgvingina hevur annars verið støðug og ligið um 15 – 20 næmingar hvørt hálvár.

Skal sigast eitt sindur um Felagið Maskinmeistaralærarar, so er felagið stovnað í 1998 sum fakfelag hjá lærarum á Maskinmeistaraskúlanum. Í "vælmaktini" taldi felagið heilar 11 limir, men eftir ein kanska rokmiklan eykaaðalfund í juni 2005 meldaðu meira enn triðingurin (4 limir) seg úr felagnum, og í dag umboðar felagið uml. 6 lærarar. Hetta kann samanberast við, at á Vinnuháskúlanum í Havn starvast uml. 24 lærarar, harav 16 undirvísa maskinmeistaranæmingum.

Tað er hesin lítli parturin uppá 6 lærarar, sum myndar ta skeivu uppfatan av skúlanum, almenningurin hevur í dag. Í sendingini 62 norður nú fríggjakvøldið úttalar lærari seg um trupulleikan at hava teoretiska frálæru eitt stað og praktiska frálæru eitt annað stað, um undirvísing, sum ikki riggar og útgerð, sum fer í órøkt. Hesin lærarin má úttala seg vegna nakrar av teimum fáu lærarum, sum hansara felag umboðar. Ikki er nakað sum týður uppá, at navigatiónslærararnir, sum eru meira enn helvtin av lærarunum, og vit tríggir maskinmeistaralærarar, sum ikki longur eru í felagnum, hava stórvegis trupulleikar við frálæruni.

Viðvíkjandi útgerðini á skúlanum undir Krákugjógv, sum lærarir ikki fáa løn fyri at viðlíkahalda, so eru tveir maskinmeistarar í starvi, sum m.a. viðlíkahalda starvsstovuútgerðina til lítar. Hetta hava teir gjørt í áravís, annar í eini fimtan ár. Fyri fáum vikum síðani vórðu royndir gjørdar við dieselmotorunum, sum riggaðu av tí besta, og í sjónvarpstíðindastubba frá el-starvsstovuni fekk ein heldur ikki ta fatan, at skúlin var í fríum falli.

Skal ein nema eitt sindur við framtíðina, og vit eru nakrir sum velja at trúgva, at skúlin og maskinmeistara- og skipsføraraútbúgvingin hóast alt hava eina framtíð, so hevur verið gjørt eitt miðvíst arbeiði við at tillaga útbúgvingarnar til ta nýggju modulskipanina og fyrireika at lyfta útbúgvingarnar upp á bachelorstøði. Hesa tilgongd síggja vit framda í londunum kring okkum. Hetta setur størri krøv til lærararnar, men kemur eisini í síðsta enda at gagna næmingunum.

So um leiðslan fær frið at gera sítt arbeiðið, og starvsfólkið arbeiðir saman um at fáa broytingarnar at rigga, er ongin grund at stúra. Hinvegin hevur ein sett sær fyri, at tað skal ikki rigga, ja so...

# Anfinn Kallsberg – avdúkar sambandsmuruna í Fólkaflokkinum

ÁKI ANDREASEN



**Á landsfundinum hjá Fólkaflokkinum avdúkaði formaðurin í Fólkaflokkinum tað ótrúliga – at Fólkaflokkurin arbeiðir betur saman við Sambandsflokkinum og fær meira burturúr saman við honum enn saman við Tjóðveldisflokkinum.**

Tað er gott, at tað umsíðir rivnaði fyri eygunum á fyrrverandi "fullveldis" løgmanninum í Føroyum. At tað so hendi á sjálvum landsfundinum hjá Fólkaflokkinum, tað ger hendingina enn meira gleðiliga – tí harvið staðfesti Anfinn Kallsberg, at hann og Fólkaflokkurin ikki sótu í samgongu við Tjóðveldisflokkinum við tí endamálið at vinna føroyingum og Føroyum fullveldi. Men at endamálið var at góðtaka "neyðloysnir", sum danska stjórnin legði fyri dagin.

**Spælið um valdið hjá Fólkaflokkinum.**

Tá fullveldissamgongan bleiv skipað, vóru vónirnar bjartar. Men tað skuldi tó vísa seg at vera ein tungur róður at røgva – tí Fólkaflokkurin segði eitt og vísti eitt annað. Øll minnast brotnar avtalur, og hvussu Anfinn Kallsberg nýtti løgmansembæti at verja sín egna persón.

Sjálvstýrið og fullveldi fyri okkara land hevur so lítið at siga fyri Fólkaflokkin, at eingin í hesum flokkinum himprast við at nýta frælsstríðið í kalda og eirindaleysa leikinum um at sleppa at sita í samgongu og harvið halda seg framat "valdsfatinum". Tað vísti seg, at flokkurin var ikki sinnaður at fremja ítøkiligu málini á fullveldisleið – tí er lætt at sita í hesari samgonguni og slúka alt sum verður sent til Føroyar til undirskrivingar. Danskir ráðharrar og danskir embætismenn fáa tað teir vilja frá sitandi samgongu og Fólkaflokkinum.

**Tjóðveldisflokkurin og semjurnar.**

Eg haldi tað er langt frá veruleikin, tá Anfinn Kalsberg á landsfundinum sigur: "- *Tann leisturin, vit nú ganga eftir í hesi samgonguni við yvirtøkulógini og uttanríkispolitisku heimildarlógini, er sami leistur, sum vit arbeiddu við í undanfarnu samgonguni*". Anfinn Kallsberg veit væl, at Tjóðveldisflokkurin ikki kann góðtaka at ein samgonga avreiðir avgerðarrætt til eina danska stjórn, sum henda samgongan hevur gjørt. "Vit halda okkum til føroysku viðmerkingarnar", segði Anfinn Kallsberg tá lógirnar blivu samtyktar – men hvør veit um hesar viðmerkingarnar? Eru tær sendar ST – soleiðis sum Anfinn Kallsberg lovaði? Og hvat virði hava viðmerkingarnar í veruliga politiska lívinum?

Tjóðveldisflokkurin gav seg nógv í seinastu samgongu – nógv meira enn hann skuldi gjørt. Og tað er ikki rætt at siga at Tjóðveldisflokkurin er "handlingslammaður", tá talan er um stig á fullveldisleið. Tað er einfalt ein spurningur um at telva seg fram til eina virðiliga loysn, har samráðingarnar eisini ganga føroyskum sjálvstýrisstríði á møti og ikki bara eru einvegis krøv og harraboð av Christiansborg.

Tá er ikki talan um at vinna Føroyum og føroyingum stig á fullveldisleið. Hví skuldi danir vera "snikkarar" til uppskot sum ger at teir missa vald í Føroyum...kom nú Anfinn, tú kann ikki billa tínum landsmonnum slíkt skvaldur inn!

**Sigur nógv um Fólkaflokkin!**

Á landsfundi Fólkafloksins segði Anfinn Kallsberg eisini: "*Tað sigur ikki so lítið um føroyskan politikk, at tað er lættari at vinna fram á sjálvstýrisleið við Sambandsflokkinum, enn við Tjóðveldisflokkinum*". Guð viti um Føroya fólk skal gráta ella flenna. Um formaðurin í Fólkaflokkinum heldur, at eitt fullveldisstríð verður vunnið við at bakka og bakka og koma við undanførslum um ein "politiskan veruleika" og geva Tjóðveldisflokkinum skuldina, so eru vánirnar ringar fyri sjálvstýrishugsandi fólkafloksfólk.

Frælsið verður ikki givið – tað má takast, eisini við samráðingarborðið – og at Fólkaflokkurin trívist, og heldur at danskt vald er í lagið – tað sigur ikki nakað nýtt um føroyskan politikk, men eina og aleina nógv um Fólkaflokkin.

# Eisini ósannleiki um valskipanina hjá Fiskimannafelagnum

ÓLI JACOBSEN



Tað tykist sum, at einki mark er fyri, hvussu fúlur og destruktivur Dan R. Petersen er í síni herferð móti sitandi formanni í FF. Endamálið er at oyðileggja mítt trúvirði fyri ein og hvønn prís, hóast tað er ein spurningur, um hann er tann rætti maður at seta spurnartekin við trúvirðið hjá nøkrum sum helst.

Nú rør hann uppundir, at valskipanin í FF er "illgrunasom", og tá viðtøkurnar stava frá míni tíð sum formaður, so er tað eisini eg, sum eri arkitekturin aftan fyri hesum.

At fara so langt sum at sáa iva um valmannagongd er ótrúliga groft, og serliga tá tað verður farið so lætt um verunleikan sum her.

**Sannleikin er hesin:**
Tá eg gjørdist formaður í 1971 hevði felagið eina felagslóg, sum var nærum óbroytt, síðan felagið var stovnað. Hon var grundað á slupptíðina, tá allir fiskimenn vóru heima í senn.

Frá 1932 var skipanin tann, at hvør sýsla kundi stilla upp eitt valevni til formann, og tað var meirilutin av sóknunum, sum her var avgerandi.

Eisini var ásett, at sjálvt valið skuldi haldast innan 48 tímar í hvørji sókn, og førdi hetta til sera misjavna luttøku. Atkvøðuseðlarnir skuldu sendast til FF, og tann, sum atkvøddi, skuldi skriva navnið á sjálvan atkvøðuseðilin.

Tá eg gjørdist formaður, fekk felagið eina heilt nýggja lóg. Viðvíkjandi valskipan vóru broytingarnar hesar:

Manningar á skipum fingu møguleika at stilla upp.

Meðan atkvøðuseðlarnir fyrr skuldu sendast til skrivstovu FFs, skuldu teir nú sendast til grannskoðara felagsins, og valini skuldu vera duld.

Tað er beinleiðis ásett, at menn, sum eru burtur, skulu hava høvi at velja, og tí er freistin at velja longd eina 1 mánaða frá 1. januar til 1. februar.

At fráboðan um uppstilling verður send felagsskrivstovuni er ein skipan, sum hevur verið galdandi síðan 1932, og eingin hevur fyrr reist nakran iva um mannagongdina, heldur ikki meðan eg havi verið formaður, og skrivstova FF hevur í míni tíð fyrr skipað fyri trimum formansvalum.

Tað er tískil einki grundarlag fyri teirri hálvkvøddu vísuni hjá Dan R. Petersen, at eg havi snøggað eina valskipan til, sum gevur sitandi formanni stórar fyrimunir. Tað er beint tvørtur ímóti við møguleikanum hjá kanska 100 manningum at stilla upp.